## Guðrið og Anna Katrina í Margarinfabrikkini




Í kvøld, fríggjakvøld, spæla Guðrið Hansdóttir og Anna Katrina Petersen við bólki í Margarinfabrikkini. Í tíðindaskrivi verður sagt, at Guðrið fer at framføra nýggj og eldri løg, í einum meira akkustiskum hami, enn tey á fløguni. Tey sum spæla við henni eru Líggjas Olsen og Flóvin Viderø báðir kendir úr bólkinum Dejavu, Andreas Dalsgaard kendur úr bólkinum The Story Ends og Ása Wraae kend úr bólkinum Budam. Anna Katrina Petersen spælir egin løg, umframt svenskan og bulgarskan fólkatónleik og teir sum manna bólk hennara eru kendir menn sum Leivur Thomsen, Brandur Jacobsen og Bjarki Meitel. Konsertin í Margarinfabrikkini verður kl. 22. og atgongdin er ókeypis. Øll eru vælkomin.

# Bjørt noktar at gera báðar undirsjóvartunlarnar ísenn



*Seinnapartin í gjár møttu sandoyingar mannsterkir í Tinganesi við kravi um at undirsjóvartunnilin ikki verður útsettur, men enn fáa teir ikki at vita um teir fáa sín vilja*

**Tað einasta, sum liggur rimmarfast, er at Bjørt Samuelsen góðtekur ikki, at tað almenna fer at gera tveir undirsjóvartunlar ísenn. Men alt annað er hon sinnað at tosa um**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað kemur ikki upp á tal, at tað almenna fer at gera undirsjóvartunnil í Eysturoy og undirsjóvartunnil í Sandoynna í senn.

Tað sigur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum eftir drúgva samgongufundin í Tinganesi í gjár.

Hon sigur, at tað hevði oyðilagt okkara kredittvirði og altso okkara fíggjarliga trúvirði, at farið undir tvær so stórar ætlanir ísenn og tað hevði eisini verið at átikið sær ein alt ov stóran vága.

- Tí er hetta tað einasta, sum liggur rimmarfast, so tann møguleikin er útihýstir, staðfestir hon.

- Tað er tað einasta, eg kann veita fulla vissu fyri, endurtekur hon fyri at skera tað út í papp, at hesin møguleikin er útihýstur.

Men tað merkir so eisini, at hon er til reiðar at tosa um allar aðrar møguleikar.

- Arbeiðssetningurin hjá mær hevur verið at finna útav, hvussu tað ber til at fíggja hesar báðar stóru verkætlanir uttan at tær ávirka møguleikan at gera íløgur í skúlar, mentan, gransking og heilsuverk, sigur Bjørt Samuelsen.

### Tveir tunlar fyri ein

Hennara upplegg til samgonguna er, at báðir undirsjóvartunlarnir skulu leggjast í eina felags verkætlan.

Samstundis skulu 50 milliónir krónur setast av á fíggjarlógini um árið í 10 ár.

Talan er sostatt um 500 milliónir tey næstu 10 árini

Men Bjørt Samuelsen sigur, at tað er nóg mikið til at fíggja báðar undirsjóvartunlarnar og tilhoyrandi vegir fyri tilsamans 1850 milliónir.

- Samstundis gevur tað okkum ráð til at gera aðrar átrokandi íløgur í útbúgving, gransking, mentan, heilsu- og almannaverk.

Bjørt Samuelsen sigur, at yvirhøvur er semja í landsstýrinum, at tað almenna skal gera báðar tunlarnir og at landið sostatt skal yvirtaka Eysturoyartunnilin frá teimum privatu, sum tóku stig til hann.

- Tað er grundstøðið, sum vit arbeiða víðari útfrá, men ber onki annað til, vil eg ikki heilt og fullkomiliga útihýsa møguleikanum at Eysturoyartunnilin verður privatur, so at báðir tunlarnir kunnu gerast ísenn.

Í hesum sambandi, skjýtir landsstýriskvinnan upp, at Eysturoyartunnilin verður gjørdur fyrst og at farið verður undir Sandoyartunnilin aftaná.

Hon skilir væl grundgevingina um, at tað er ræstast at byggja tunnil fyrst til eitt øki, har einki fast samband er.

- Tá vit kortini mæla til at gera Eysturoyartunnilin fyrst, er tað tí at, sum støðan er nú, er tað sera tørført at fíggja Sandoyartunnilin.

- Hinvegin er Eysturoyartunnilin ein íløga, ið ber seg sera væl og verður hann gjørdur fyrst, hava vit inntøkurnar frá hesum tunli at fíggja Sandoyartunnilin við, sigur hon.

Hon sigur, at skal Sandoyartunnilin fíggjast á fíggjarlógini, krevur tað, at 175 milliónir krónur verða settar av árliga í 4 ár.

- Hetta verður ikki mett gjørligt, tí tað fer at forða fyri øðrum átrokandi íløgum.

Hon sigur, at inntøkurnar frá Sandoyartunnlinum verða so lágar, at tær neyvan røkka til rakstur og enn minni til rentur og avdrøg.

- Skal Sandoyartunnilin fíggjast upp á 10 ár, mugu í minsta lagi 80 milliónir setast av á fíggjarlógini um árið , og restin fíggjast við láni og hetta fer at gera Sandoyartunnilin munandi dýrari enn um báðir tunlarnir verða gjørdir í felags verkætlan.

- Við hesari loysnini koma eysturoyingar ikki at gjalda meira, enn teir annars høvdu gjørt. Munurin er bara at tey, sum koyra gjøgnum Eysturoyartunnilin, koma at gjalda til samfelagsíløgur í staðin fyri til eitt privat felag, sigur landsstýriskvinnan.

# Páll og Gerhard svovið væl í nátt

**Teir báðir tingmenninir úr Sandoynni halda, at tað loysti seg væl at vera treiskir. Eftir samgongufundin í gjár síggja teir ordiliga fyri sær, at Sandoyartunnilin verður veruleiki um heilt stutta tíð.**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Enn eru ikki allar súður syftar, men nú hevur samgongan hevur givið sær sjálvum freist til á ólavsøku at finna semju um undirsjóvartunlarnar Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu eru rættiliga bjartskygdir og Gerhard Lognberg sigur, at mótmælisgongan úr Sandoy í gjár í Tinganes hevði ógvuliga positiva ávirkan á málið*

Páll á Reynatúgvu og Gerhard Lognberg, høvdu ein góðan dag í gjár.

Tað eru teir í hvussu so er, púra sannførdir um sjálvir.

Í eitt hálvt ár hava teir treiskast fyri at fáa undirtøku í samgonguni fyri at fara undir Sandoyartunnilin næsta ár og teir hava enntá verið til reiðar at seta samgonguna í vanda fyri at fáa sín vilja, tí teir hava ikki viljað hoyrt talan um, at útseta hann.

Í gjár viðgjørdi samgongan so spurningin um báðar undirsjóvartunlarnar og niðurstøðan var, at nú skal ein nevnd setast við tveimum umboðum fyri hvønn av teimum trimum samgonguflokkunum, umframt landsstýriskvinnuni í vinnumálum, Bjørt Samuelsen og landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Karsteni Hansen.

Nevndin skal vera liðug við sítt arbeiði á ólavsøku, tá ið úrslitið aftur skal leggjast fyri samgonguna.

Enn er ikki avgjørt, hvør annar skal manna bólkin, men tað er rættiliga vist, at teir báðir sandoyartingmenninir, Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu vera við í bólkinum.

Grundstøðið undir arbeiðsbólkinum, verður uppleggið hjá landsstýriskvinnuni í vinnumálum, sum vit nema við í hinari greinini her á síðuni.

Og tað loysti seg hjá teimum báðum, Gerhardi Lognberg og Pálli á Reynatúgvu at treiskast um Sandoyartunnilin, tí teir eru rættiliga væl nøgdir við fundin í gjár.

Teir eru báðir samdir um, at teir merktu ein ektaðan vilja í samgonguni til at finna eina semju.

Men Gerhard Lognberg ásannar, at tað leikaði rættiliga hart á og at teir báðir sandoyartingmenninir vórðu lagdir undir hart trýst, tí tað vóru ikki øll í samgonguni, sum eru so heit fyri Sandoyartunlinum.

Hann vil tó ikki nevna nøvn.

Treytaleysa kravið frá teimum báðum sandoyartingmonnunum hevur verið, at farast skal undir tunnilin 1. november næsta ár, soleiðis sum Løgtingið hevur samtykt.

- Men skulu vit finna eina semju, er neyðugt at allir partar sleppa treytaleysum krøvum og tað hava vit sandoyartingmenn eisini gjørt, sigur Páll á Reynatúgvu.

- Tað er neyðugt at hava yvirskot til at finna eina semju, leggur hann afturat.

Men teir staðfesta báðir, at tað kemur framvegis ikki upp á tala at Sandoyartunnilin verður útsettur í fleiri ár.

Hetta merkir, at teir krevja báðir tveir, at skjøtil skal vera settur á Sandoyartunnilin í hesum valskeiðnum.

- Ver ikki svakur, tað er jú tað, sum alt snýr seg um og tí kemur ikki upp á tal at útseta tunnilin í fleiri ár, staðfestir Gerhard Lognberg.